## Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# VALÁR VIÐ TVEIMUM VALUM

Við nýggja árinum eru vit farin inn í valár við tveimum valum – bæði til Løgtingið og til Fólkatingið.

Útvarpið hjá Kringvarpinum setti í hesum sambandi floksformonnunum stevnu um nýggjárshalguna, og tað var eisini júst tað, sum eyðkendi sendingina. Eitt nú segði Jenis av Rana, at vit mugu hava eitt løgtingsval ongantíð ov skjótt. Høgni Hoydal tosar um val í vár og melur upp í saman um eina savningarstjórn, meðan Jóannes Eidesgaard ásannar, at heystið er gott at halda val í, eins og gamalt var, tí so fáa vit eina líkinda fíggjarlóg samtykta uttan órógv av vali.

Grundgevingarnar kunnu verða so mangar. Men júst vansin við at halda val í november var so mangan orsøkin til, at fíggjarlógin ikki fekst upp á pláss. Seinasta mansaldurin er tað bara eydnast eina ferð at skipa eina samgongu fyri jól, tá valið var í november. Tað var í 1970, tá Atli Dam skipaði sína fyrstu samgongu. Men vit kunnu samstundis ásanna, at síðani 1998 hevur tað tikið væl styttri tíð at skipað samgongu.

Vit kunnu so halda tað um samgongu og landsstýri, sum vit vilja. Men vit hava ta stjórn, vit hava valt. Tað høvdu vit eisini fyrstu mánaðirnar av hesum valskeiðinum, tá Tjóðveldi eisini sat í fremstu røð. Men tað tykist so barnsligt og fornermað at tosa um savningarstjórn ella bjargingarstjórn. Álvaratos – ein andstøða má hava onkur hægri mál at seta sær.

Veljarakanningar síðani valið benda ikki á nakað stjórnarskifti. Tær vísa fyri so vítt bara, at Sambandsflokkurin etur sínar samstarvsflokkar, fyrst og fremst Javnaðarflokkin, sum hevur havt ilt við at prógva sín politikk – sína hugsjón í verki. Hann gjørdi eina roynd undan jólum at vísa vøddar og vísa, at flokkurin tordi at siga, hvar skápið skal standa. Ta ultimatumið, sum flokkurin setti, helt, og full semja fekst í fíggjarnevndini, meðan breið semja fekst í løgtinginum fyri fíggjarlógini.



Hetta vísir enn einaferð, at tað gongur betur at gera avtalur millum persónar á tingi enn millum flokkar – og er eitt skúladømi uppá, at politisku flokkarnir fungera í besta lagi illa.

Hóast tað er óvíst, um vit fáa eitt várval ella eitt heystval til løgtingið, so tykist mangt benda á, at vit fáa eitt várval til Fólkatingið, og har benda kanningar á, at tey fáa eitt stjórnarskifti. So greiðar ábendingar hava vit ikki her, tí hóast samgongan varðveitir sína umboðan, so er tað eingin trygd fyri, at hon heldur fram eftir valið, tí blokkarnir í Føroyum verða skipaðir eftir valið, og samgongumøguleikar duldir sum mansmorð.

**Persónarnir samstarva betur enn flokkarnir**



## Einki er størri enn Kringvarpið

Millum jólanna var Planet Awards hildið. Hetta er stórt tiltak, sum skal varpa ljós og ljóð á føroyskan tónleik. Heiðurslønir verða lætnar, fremstu tónleikararnir eru við, og fleiri live-framførslur eru frá teimum, sum hava verið frammi í árinum. Hetta er eitt rættiligt hátíðarkvøld fyri føroyskan tónleik, sum hevur so nógv spennandi at bjóða. Planet Awards er eitt tiltak hjá Miðlahúsinum, og Rás2 sendir alt beinleiðis.

Hetta skuldi verið eitt upplagt høvi hjá Kringvarpinum at verið við at sett føroyskan tónleik í fokus, men Kringvarpið ómakaði sær ikki at verða til staðar mikukvøldið í farnu viku.

- Hetta snýr seg um føroyskan tónleik og ikki fyriskipararnar, men einki er størri enn Kringvarpið, og tá Kringvarpið ikki hevur hug at verða við, so halda tey seg burtur, sigur Jonhard Hammer, stjóri á Rás2.

- Nú hevur Kringvarpið onkur ár skipað fyri líknandi tiltaki, men tað gera tey heldur ikki longur, og tí kann tað tykjast løgið, at tey bara ignorera føroyskan tónleik á hendan hátt. Um tað er ein trupulleiki, at tað er Miðlahúsið, sum skipar fyri tiltakinum, so kunnu vit lata fyriskipanina av Planet Awards víðari til onkran annan, so føroyskur tónleikur ikki kemur at svíða fyri, at tað eru júst vit, sum hugsa um tey, sigur Jonhard Hammer.



**Halt á við sama treysti Rósa!**

JÓHAN HERI JOENSEN
KJAK Á SÍÐU 16



**Ikki semja um fíggjarlóg**

BJØR SAMUELSEN
KJAK Á SÍÐU 16



## Vaktarskifti á Kongabrúnni

Leygardagin tók Regin Hammer við sum stjóri á Tryggingarfelagnum Føroyar, og Gunnar í Liða legði frá sær eftir at hava røkt stjórastarvið í góð 10 ár.

Tað var fyri tveimum mánaðum síðani, at Gunnar í Liða boðaði frá, at hann fer úr starvi sum stjóri á Tryggingarfelagnum Føroyar av persónligum orsøkum. Hann hevur starvast hjá Tryggingini í fleiri enn 15 ár, harav stívliga 10 ár sum stjóri.

Regin Hammer er 37 ára gamal og hevur Master útbúgving í búskapi frá University of Dundee. Hann hevur verið stjóri í egnari ráðgevingarfyritøku síðani 2006 og m.a. verið umboðsmaður fyri DONG Energy A/S seinastu árini.

Samstundis sum stjóraskifti fer fram í Tryggingarfelagnum Føroyum er felagið í samráðingum við Finansiel Stabilitet um keyp av Eik Banka. Alment er tað enn bara Tryggingarfelagið Føroyar - gjøgnum móðurfelagið TF Holding - sum hevur víst áhuga í at keypa bankan, sum fór av knóranum 30. september.

Sølutilgongdin hevur ikki gingið so lætt, sum Finansiel Stabilitet ætlaði, og enn er óvíst, um handilin verður veruleiki - hann er blivin bæði jólatrøll og nýggjárstrøll. Tað verður so helst uppgávan hjá nýggja stjóranum at finna fram til, um handilin verður egg ella ungi.

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*